# Vælkomin á Sundalagsstevnu 2005

Sundalagsstevnan skiftir ímillum Sunda kommunu og Tórshavnar kommunu, tvey ár í Sunda kommunu og eitt ár í Tórshavnar kommunu, í ár verður sundalagsstevna hildin í Hósvík og er hetta fyrsta árið stevnan verður hildin í Sunda kommunu.

Sundalagsstevna hevur stóran týdning fyri okkara ungdómsfeløg í kommununi og vóna vit at tað eisini í ár eins og undanfarnu ár verður ein góð og spennandi stevna fyri okkara ungdóm, og okkara virknu feløg í kommununi, og sum kemur at geva okkara gestum eina góða og spennandi uppliving á okkara stevnu.

Øll tey sum fyrireika sundalagsstevnuna vilja skipa so fyri at allir gestir og vit sum her búgva fáa eina góða uppliving, og tá sundalagsstevnan er av kunnu siga at vit øll hava havt eina góða stevnu.



Tað sum eisini hevur stóran týdning á eini summarstevnu er sjálvsagt veðrið og vóna vit at tað fer at eyðnast, og at vit øll saman við okkara gestum koma at leggja okkara til soleiðis at vit fáa eina spennandi og góða sundalagsstevnu.

Eg fari vegna Sunda kommunu at bjóða øllum vælkomnum á Sundalagsstevnu í Sunda kommunu og vælkomin á stevnu í Hósvík 2005.

***Heilsan***
***Heðin Zachariasen***
***Borgarstjóri.***

*Sosialurin 341800*


HOTEL VÁGAR *** THE AIRPORT HOTEL





## KOKKA- og TÆNARALÆRLINGAR



Ert tú tænastuhugaður?
Tosar tú fleiri mál?
Dámar tær væl at vera millum fólk?
Siga hotel, matstova og ferðafólkavinna tær nakað?

So kunnu vit bjóða tær -

Eitt fjølbroytt lærupláss!
Góðan arbeiðsanda!
Eitt virki í framgongd!

Stutt sagt einar dyr til framtíðina!

Vilt tú vita meira kanst tú ringja á tel 30 90 90 og spyrja eftir Kára Hentze

Hotel Vágar / Rio Bravo

TEAM85

RIO · BRAVO RESTAURANT

HOTEL VÁGAR


# Vestmanna Skúli

Søkt verður eftir lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2005/2006 fyri lærara í barnsburðarfarloyvi. Tímatalið um vikuna er 21.

- Ítrótt í 2. og 3. fl.
- Heimkunnleika í 5. fl.
- Føroyskt í 5. og 8. fl.
- Handaverk og list í 2. fl

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsningar fáast við at venda sær til skúlaleiðaran, tlf. 470100 ella 424449, ella frá Jógvan í Dávastovu, formann í skúlastýrinum, tlf. 424566.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 2. juni 2005.

**Vestmanna Skúlastýri**
v/ Jógvan í Dávastovu
350 Vestmanna


Sosialurin
www.sosialurin.fo




## Ellis- & avlamisheimið í Vágum

## Søkir eftir

**Sjúkrarøktarfrøðingi** til fast starv uppá 0.5 tíð at byrja 1. oktober 2005. Arbeitt verður í skiftandi vaktum, tó í løtuni mest kvøldvakt.

**Ergoterapeuti** til avloysarastarv uppá 0.8 tíð vegna barnsburð at byrja umleið 1. sept. og 28 vikur fram.

**Heilsuatstøðingi ella heilsuhjálpara** til avloysarastarv uppá 0.5 tíð vegna barnsburð at byrja skjótast tilber og 28 vikur fram.
Arbeitt verður í skiftandi vaktum.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin hevur førleika, hug og hegni at veita brúkaranum eina góða tænastu við teimum møguleikum sum dagsins eldrapolitikkur gevur rúm fyri.
Góð samstarvsevni hava stóran týdning.

Løn verður eftir avvarðandi sáttmála, sum einstaka felagið hevur við fíggjarmálaráðið.

Umsókn við neyðugum prógvum v.m. verður at senda til heimið áðrenn 5. juli 2005.

Áhugaðir umsøkjarar eru vælkomnir at venda sær til leiðaran á tlf. 332600 fyri at fáa meira at vita.

## Sjóbjargingarstøðin MRCC-Tórshavn

Tlf: +298 351300 • Fax: +298 351301
Telex: 81200 TLGR FA
Inmarsat C: 423 116210 • Inmarsat B: 323 116220 (voice)
323 116221 (Fax)

# Fráboðan um seismikkvirksemi

Lýst verður, at seismiskar kanningar verða gjørdar á hesari havleið.

| | |
|---|---|
| Útnyrðingshornið | 60º30' N 008º30' W |
| Landnyrðingshornið | 60º30' N 007º00' W |
| Landsynningshornið | 60º00' N 007º00' W |
| Útsynningshornið | 60º00' N 008º30' W |

Felagið Fugro kannar økið.
Kanningarnar verða gjørdar vegna Føroya Kolvetni.

Byrjað verður umleið.............................. 21-06-2005
Arbeiðið tekur væntandi.............................. 3 dagar
Skipanavn............................................. Polar Princess
Kallibókstavir/Flagg............................ JXBV3/Norskt
Fiskiveiðiumboð.................................. Magni Skaale

Samband fæst við skipið á VHF rás 16.

Upplýsingar um kanningararbeiði fáast frá Tórshavn Radio, á telefon 351300, ella á telefax 351301.

Eisini verður víst til heimasíðuna www.mrcc.fo.